


## Øðrvísi jólakalendari í Vinnuhúsinum

Vinnuhúsið hevur gjørt ein heldur øðrvísi jólakalendara, har ein letur lúkur upp, men ikki beinleiðis fær nakra gávu. Ístaðin fær tann forvitni, við at lata eina lúku upp hvønn dag til jóla, vitan í gávu. Í dag var spurningurin »Hvat er munurin á einum arbeiðsgevarafelag og einum vinnugreinafelag?«. Og í lúkuni verður hesin munurin so útgreinaður.

## Eik banki gongur undan í Klaksvík

### Helt nýggi deildarleiðarin, Hilmar Sam Lamhauge fyri og endurgav Norðlýsið

- Tann 19. mai skrivaði Norðlýsið, at "Eik Banki gongur undan í Klaksvík" Tá var stóra glasfasadan liðug, og ein kundi siga at tað hendan várdag í mai spíraði í Klaksvík bæði so og so segði nýggi deildarleiðarin hjá EIK í Klaksvík, Hilmar Sam Lamhauge til hátíðarhaldið fríggjadagin. Og hann helt fram:

- Hetta orðafellið, um eg so má siga, "Eik Banki gongur undan í Klaksvík" kann brúkast í fleiri samansetingum um Eik, men júst her var meint við tað arkitektoniska, at hesin bygningur ikki bert er ein fornaldarlig grótlaging – men at bygningurin er nútímans, og prýðir um í miðbýnum.

Facadan hevur reinar linjur og er klødd við gróti, móttøkan er opin upp í aðru hædd, upp til balkongina, sum kann ímynda Víkina – altso Klaksvíkina. Við hesi opnu móttøkuni og stóru glasfacaduni norðureftir, við tí flotta útsýninum, blívur inniumhvørvið ein partur av útiumhvørvinum.

Hilmar Sam Lamhauge segði at enda, tað er honum ein æra at saman við sínum starvfólkum at vera við til at leggja ein hornastein undir framtíðar virksemi hjá Eik í Klaksvík og í Norðoyggjum.

# Eitt prýði fyri Klaksvík

### Borgarstjórin fegnaðist um, at Eik Banki nú verður ein sjónligur aktørur í Klaksvík

NÝGGJUR BYGNINGUR

*Jan Müller/Árni Joensen*

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, duldi ikki fyri, at hann telist millum teirra, sum eru hugtikin av tí nýggja bygninginum hjá Eik Banka í Klaksvík, men hann helt eisini, at Eik Banki hevur havt eina hepna hopnd við at finna sær eitt stað at seta bygningin á.

Sjálvur er hann uppvaksin hinumegin vegin, og hann mintist, hvussu hann og javnaldrarnir plagdu at fara inn til Haldor Holm at keypa „tjúguoyrakaku". Steinbjørn Jacobsen nevndi hjúnini Haldor og Olgu Holm og lýsti tey sum ein part av býarmyndini í Klaksvík tá, Hann helt fyri, at plássið, sum Eik Banki hevur valt, hevur ein dám av trivnaði, góðum minnum og framburði.

Steinbjørn Jacobsen vísti á, at Eik Banki hevði veitt munagóðan stuðul, tá standmyndin Fípan Fagra bleiv gjørd. Tá hon bleiv avdúkað í summar, helt Bjarni Olsen, stjóri í Eik Banka, røðu, og nevndi millum annað, at bankin leggur dent á vakurleika og tað listarliga. Borgarstjórin helt, at tann nýggi bygningurin prógvar orðini hjá stjóranum.

- Vit vita frá hesum seinastu árunum, at Eik Banki er ein sterk og væl virkandi fyritøka, sum ynskir framburð og trivnað, har hon virkar. Við hesi deildini her í Klaksvík gerast møguleikarnir innan fígging her í økinum enn fleiri, har tit sum banki gerast ein ógvuliga sjónligur aktørur – og hetta gleðast við um, segði Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri at enda.



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, ynskir Hilmar Sam Lamhauge tillukku við starvinum og bygninginum*

*Mynd: Jan Müller*



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, her saman við Marner Jacobsen, Eik-stjóra*

*Mynd: Dávur Winther*